# BØNARLØTAN

**JUNI - JULI - AUGUST 2025 40. árg.**

***1. dagur*** ***Áp. 5.1-20, Áp. 12.1-25, Áp. 20.1-16***



## ZAREPTA

Minnist summarlegurnar. Biðið fyri luttakarum, leiðarum og hjálparfólki, og at Harrin signar arbeiðið. Minnist legurnar í Zarepta, í Glostrup, á TeenStreet í Týsklandi, í Versoix í Sveis, við Ástjörn í Íslandi, í Naalersitaq og Nimerialik í Grønlandi og í Uruapan í Meksiko. Biðið fyri summarlegum kring heimin, har børn, ung og vaksin savnast um orð Guds.

**KRINGVARPIÐ**
1. juni ............ útvarpsmøti, Hebron, Argjum
3. august ......... útvarpsmøti, Hebron, Leirvík

**IKTUS**
12. juni ........... Svenning av Lofti talar *(endursent 15. juni)*

**EVANGELISKA RØDDIN á ras2.fo (meir á www.evr.fo)**
Sunnukv.......... kl. 21…Kelduvaðið *(endursent hóskv. kl. 21)*
Týskv................kl. 21....Á torginum *(endursent sunnud. kl. 12.30)*

***2. dagur 3. Mós. 19.1-18, 3. Mós. 26.27-46, Neh. 13.15-31***

**MEKSIKO, Michoacán, Puruandiro**
**Hansy og Martin Tuohy**
**Emma Grace 17, Jónatan 15, Markus 13, Evita 10, Joy 8**



Evangeliska tiltakið AMOR Divino verður 1.-6. juni í Uruapan. Vit býta út traktatir, Jóh.-evangeliið og bjóða áhugaðum til bíbliutímar. Um kvøldarnar eru tiltøk í miðbýnum. Gentu-, dreingja- og ungdómslegurnar verða í juli/august. Biðið eisini fyri Guicho og Roua, Chuy og Paulina, at tey ikki missa mótið og halda út í tænastuni í Puruándiro.

**GRØNLAND, Nuuk**
**Naalakkap Jiisusip Oqaluffa**
**Hans Sivertsen**
Vit takka fyri hjálparfólk til legurnar í summar, fyri tann góða matin og fyri allar bønir. Tørvur er á fólki at hjálpa til við matgerð og reingerð á ungdómsleguni 28. juli - 2. aug., og at fleiri koma 6. juni við Thorvald Gaardlykke at umvæla ymiskt, tel. 519191.

## 3. dagur Áp. 5.21-42, Sálm. 53 og 54, Áp. 20.17-38

### TURKALAND, Istanbul
### Annika og Stephen Everett (fjararb.)



*Kurban Bayram* (sláturhøgtíðin) verður fyrst í juni. Biðið, at Harrin vísir teimum sanna ofrið, sum reinsar frá synd. Ein ung trúgvandi kvinna í Istanbul varð myrd herfyri av fyrrverandi manni sínum. Minnist tey turkisku trúgvandi, ið fara á outreach komandi mánaðirnar, og toymisleiðararnar. Ofta eru eingi trúgvandi í økjunum. Vit fara aftur til Onglands 12. juni.

### DANMARK, Keypmannahavn
### Susan og Øssur Berghamar



Vit verða her meginpartin av sumrinum og stuðla tí virksemi, sum fer fram, nú mong fara í summarfrí. Møti eru framvegis hvønn sunnumorgun, vit vitja føroyingar, og andaktir eru á sjúklingahotellinum. Vit eru eisini fegin um tað samfelag, vit hava við fólk, sum ferðast henda vegin gjøgnum summarið.
berghamar@kristnastova.dk

## 4. dagur 3. Mós. 19.19-37, Áp. 13.1-25, 1. Kong. 1.1-27

### FILIPSOYGGJAR, Nayba, NTM
### Liz og Ragnar Niclasen

Allar sunnudagar í juni og juli og tveir sunnud. í aug. skal eg skal læra menn at evangelisera og hjálpa samkomuni at taka ábyrgd. Ein góður ábyrgdarmaður doyði herfyri, og ein annar hevur 2½ tíma at ganga hvønn vegin til møti. Biðið fyri hesum stóra átaki. Eg kenni meg veikan, men ongin annar er. Craig og familjan koma at vitja okkum í aug. Vit gleða okkum til hesar dagar.

## *5. dagur* *Sálm. 49, 3. Mós. 27.1-34, Áp. 21.1-17*

**USA, New Tribes Mission, Alabama**
**Judy og Óli á Grømma Jacobsen**



Eg undirvísi stundum uml. 20 fólkum í okkara aldri í samkomuni, har vit ganga á møti. Skal eisini hava fleiri møtir á netinum við leiðarar í Asia og í Evropa. Vit skulu fyrireika okkum til skeið fyri trúboðarar, ið virka í Tailandi og nøkrum av grannalondunum, og til, at eg skal tala á árligu stevnunum í Tailandi.

**USA, North Carolina**
**Charlotte, Calvary Church**
**Gudny og John Munro**

Vanliga virksemið er minni, men nú eru eisini legur fyri børn og ung, tónleikalegur umframt *Vacation Bible School* (VBS). Alt hetta krevur tíð og orku. Biðið, at vit fremja Harrans vilja, og at nógv koma til trúgv.

*5. august fyllir Karis Flanagan 12 ár

## *6. dagur* *Áp. 6.1-15, Áp. 13.26-52, 1. Kong. 1.28-53*

**DANMARK**
**Glostrup Frikirke**

Sven Straarup hevur bíbliutímarnar (á donskum) á hvítusunnuleg-uni í Undløse. Allar sunnudagar í summar verður breyðbróting kl. 11 og møti kl. 12.

**MEKSIKO, Mixtec, Oaxaca**
**Inga McKendry**

Vit endurskoða nøkur brøv áðrenn endaligu útgávuna. Biðið, at allir skeivleikar verða rættaðir.

## 7. dagur — 3. Mós. 20.1-27, Neh. 6.1-19, Sálm. 59

**PAPUA NÝGUINEA,**
**Sorimi (fj.arb.)**
**Carol og Poul Joensen**



Vit vitjaðu samkomuna í Sorimi og bygdu okkum eini lítil hús, meðan vit vóru har. Minnist næmingarnar, bæði tey, ið eru á bíbliuskúlanum, og tey, sum eru í trúboðaralæru, nú tey gera seg liðug við øll skeiðini. Má Harrin vísa teimum vegin fram. Carol og eg undirvísa og hjálpa til restina av skúlaárinum.

**Anna og Hans Djurhuus**
Síðsta føroyska møtið áðrenn summarfrítíðina verður leygard. 7. juni kl. 19 í Bethaniakirkjuni, Dag Hammarskjøldsgade 2a, Aalborg. Byrjað verður aftur í sept. Biðið fyri møtinum.

**FØROYAR**



**– Elin og Jógvan Jacobsen**
**– Unn og Jógvan Zachariassen**
**– Lis Zachariassen**
**– Annika og Poul Færø**
**– Anna og Óli Steinberg**
**– Maria og Jens Bech**

## 8. dagur — Áp. 7.1-19, Áp. 14.1-28, Áp. 21.18-40

**NTM - FØROYAR**
**Noomi og Eli Christiansen**
**Hadassa 14, Tabita 11, Debora 9, Natan 6**
8. juni setur felagsskapurin *A Third of Us* fokus á bøn fyri teimum ónáddu. Triðingur av heimsins íbúgvum stevnir móti ævinleikanum uttan Gud, men veit tað ikki - *www.athirdofus.com*. Seinasta freist at søkja á bíbliuskúlan North Cotes College er 30. juni.

**FØROYAR**
**Shamila og Høgni Johannesen**



Biðið fyri møtum, samtalum, STEVN og verkinum í Pakistan, at Harrin gevur okkum styrki. Boðað verður frá møguligum kríggi millum Pakistan og India. Biðið fyri teimum kristnu í báðum londunum, ið verða kúgað og eru fyri ágangi. Ófriðurin kann elva til, at minnilutar verða álopnir.

***9. dagur 3. Mós. 21. 1-24, Neh. 7.1-38, 1. Kong. 2.1-27***

**FØROYAR**
**Else og Poul Johan Djurhuus**

22. juni fyllir Poul Jóhan 75 ár. Dagurin verður hildin sunnud. 22. juni kl. 17 í Berøa við sangløtu og drekkamunni. Øll eru hjartaliga vælkomin, eingin tilmelding. Poul Jóhan verður í Hirtshals 11.-22. juli á evangeliseringsferð saman við Atlantic Mission. Møtir og barnamøtir verða á Malta. Opin kafé verður í leigaðum hølum niðast í gongugøtuni.

**– Anna Maria og Rógvi Joensen**
**– Khuldah og Sámal Mikkelsen, Ester 14, Samuel 10**
**– Dora og Niels Pauli Nónstein, Kristina 14**
**– Danjal og Synnøve av Rana, Anna Emilie 10, Lukas 5**

**OM, SUÐURAFRIKA, OM REACH**
**Tanja og Kurt Abrahams**
**Hanna 1**

Vit verða í Føroyum í summar. Takk fyri bønir í sambandi við visum og onnur loyvir.

*9. juli fyllir Elliot Poulsen 9 ár

## *10. dagur* *Áp. 7. 20-40, Sálm. 55, Áp. 22.1-30*

**DANMARK, Kristnastova**
**Ásla og Bárður Norðberg**
**Andrea 4, Boas 3**



Einans morgunmøti sunnud. kl. 11 verða frá mitt í juni. Hetta er tíðin, tá fólk flyta aftur til Føroya, og nýggj koma niður. Biðið fyri teimum trúgvandi, ið flyta uttanlands at lesa, at tey verða varðveitt í trúnni, og at vit sum samkoma eru eitt ljós millum føroyingar í Keypmannahavn.

**ATLANTIC MISSION**

Biðið fyri evangeliseringsferðini til Hirtshals 11.-21. juli. 24 ung og eldri luttaka. Biðið um varðveitslu, at fólk verða frelst, og at samkoman í Malta verður signað av vitjanini.

## *11. dagur* *3. Mós. 22.1-16, Áp. 15.1-21, 1. Kong. 2.28-46*

**DANMARK, Kolding**
**Anne og Jan Zachariassen**

Jens Pauli í Dali er farin at arbeiða við TeknBíbliuni í Føroyum. Eg fari at ferðast til Føroya av og á og hjálpa honum. Trý deyv hava biðið um dóp í samkomuni hjá okkum í juni. Bæði Anne og eg hava pínu í beinunum. Minnist okkum.

**DANMARK, Odense**
**Árni Helmsdal**

Í summarveðrinum vóna vit, at fleiri hava hug at steðga á at fá eitt prát um trúgv, tá vit eru á gøtuni við evangeliinum. Biðið, at Harrin skal leiða fólk til okkara í býnum.

## *12. dagur* *Sálm. 50, Neh. 7.39-73, Áp. 23.1-16*

**ONGLAND, Cornwall**
**Anna og David Rodda**

Dubby hevur verið innlagdur og tørvar nú heimahjálp. Nýggja

bíbliuútgávan er nú komin til Senegals, og tað vilja vit fagna. Fólkið kennir søgurnar um Ádam og Ábraham frá islam, men kunnu nú eisini lesa um Jesus, hvørs sendiboð vit eru, á saafi, bæði við rómverskum og arabiskum bókstavum. Útgávan kann virka fyri, at saafi nú verður viðurkent mál í landinum. Biðið, at Jesus verður ærdur.



## *13. dagur — Áp. 7.41-60, Áp. 15.22-41, 1. Kong. 3.1-15*

**GRØNLAND, Qaqortoq**
**Marjun og Páll Poulsen**

*Brøður, biðið fyri okkum!* Í 1.Tess. 5.25 heitir Paulus á tey trúgvandi í Tessalonika. Nevnir einki serstakt, einki ávíst, einki dømi, men breitt, fevnandi og uttan nakað mark. Ein góð regla í sambandi við bøn er: Um eg var í teirra skóm, hvat hevði eg so ynskt, at trúgvandi bóðu fyri mær, mínum kæru og mínum verki og tænastu? *Eg (Ezekiel) ... kom so hagar, ið tey búðu; og eg sat í sjey dagar har ímillum teirra og stardi fram fyri meg*. Ez.3.15

**GRØNLAND**
**Juvel II**
**Gull-Britt og Karsten Hansen**

## *14. dagur — 3. Mós. 22.17-33, Neh. 8.1-18, Sálm. 60*

**ITALIA, Molise**
**Heidi og Regin Guttesen**
**Trisha 13, Emma 9**



Vit eru takksom fyri fígging til at keypa bygning til okkara samkomu. Nú skulu umvælingar gerast, so vit kunnu flyta inn í sept. Biðið fyri stórum barnatiltaki 14. juni og fyri Parola 4.-11. aug.

**GRØNLAND, Qasigiannguit**
**Solveig og Daniel Kinda**

| *15. dagur* | *Áp. 8.1-17, Áp. 16.1-21, Áp. 23.17-35* |
|---|---|

**FØROYAR**
**Anna og Símun Pætur á Torkilsheyggi**
Takk fyri bøn og stuðul. Vit bæði stríðast við ymisk likamlig brek, hetta órógvar nakað. Bíbliuskeiðið 2025 er 25.-30. aug. Tekning er hjá Giddu Vang frá 15. juli á tel. 265390. Evnið er: *Jesus Kristus og koma Hansara í skýnum.* Sálm. 90.1-2.



**Birgit og Svenning av Lofti**
Vit ætla at vitja smáu samkomurnar. Sangkvøld verða í Ebenezer 26. og 27. juli. Svenning og Birgir Andreasen samskipa.

**– Rutt og John í Skemmuni**
**– Vanja og Svein í Prestgarði, Terji 13, Petra 11**
**– Birita og Petur á Roykheyggi**

*15. juni fylla Micah og Ruben Magura 12 ár

| *16. dagur* | *3. Mós. 23.1-22, Neh. 9.1-25, 1. Kong. 3.16-28* |
|---|---|

**DANMARK, Hirtshals, Malta**
**Ansa og Arnold Mortensen**
**Ewelina 15**
Vit vænta nógvar gestir í summar. Atlantic Mission kemur í juli. Biðið, at nógvir danir vísa áhuga fyri boðskapinum, og at okkara samkoma verður eitt stað, sum eisini danir vilja taka til sín. Verið vælkomin at vitja.

*16. juni fyllir Emma Guttesen 9 ár
*16. juni fyllir Lukas av Rana 5 ár

## *17. dagur* *Áp. 8.18-40, Sálm. 56, Áp. 24.1-27*

**ONGLAND, Personal Support Matters**
**Claire og Craig Niclasen**
**Rebekah 17, Lydia 15**

Biðið, at eg, Claire, haldi meg tætt til Jesus og eri Honum lýðin í øllum. Í summar arbeiði eg við fýra ymiskum undirvísingarskeiðum; hetta er tað mesta, eg havi havt í einum. Í aug. vitja vit Liz og Ragnar á Filipsoyggjum.

**ÍRLAND, Global Serve International**
**Guðrun og Ivor Tutty**

## *18. dagur* *3. Mós. 23.23-44, Áp. 16.22-40, 1. Kong. 4.1-19*

**SVEIS, Versoix, Redeemer Grace**
**Jeanette og Solomon Magura**
**Reuben 12, Micah 12**

Fleiri í samkomuni vilja verða doypt í juni. Vit fyrireika samkomuleguna, ið verður síðst í sept. Biðið, at Harrin signar bæði luttakarar og leiðslu.

## *19. dagur* *Sálm. 51, Neh. 9.26-38, Áp. 25.1-27*

**USA, Nebraska, Ethnos 360**
**Rachel og Peter Hansen**



Tíðin í Føroyum var eggjandi og góð. Biðið, at vit skulu fáa vísdóm at hjálpa trúboðarum runt um í heiminum. Vit fara at virka heimanífrá í summar.

**ONGLAND, European Christian Mission**
**Dorit og Simon Marshall**

## *20. dagur* *Áp. 9.1-22, Áp. 17.1-20, 1. Kong. 4.20-34*

**PAPUA NÝGUINEA, Kovol**
**Natalie og Philip Hansen**
**Louis 8, Timon 6, Manuel 1, Salome 1**

Komandi mánaðirnar gera vit miðvíst átak aman við kovolbørnum, eisini fyri at læra málið samstundis. Biðið, at okkara børn knýta sambond við børn úr bygdini, og at hetta hjálpir okkum at knýta tættari sambond í samfelagnum.

**INDONESIA**
**Krissy og Daniel Hansen**
**Zephaniah 4, Selah Rose 2**

Vit fara nú aftur til asmatfólkið. Okkum tørvar vísdóm at loysa spenta støðu í bygdini, áðrenn vit flyta hagar í aug. Biðið, at Gud leiðir fyrireikingarnar, og at Hann gevur okkum samstarvsfelagar. Krissy hjálpir at skipa NTM ráðstevnu her í Papua 28. juli - 1. aug.

*20. august fyllir Boas Norðberg 3 ár

## *21. dagur* *3. Mós. 24.1-23, Neh. 10.1-39, Sálm. 61*

**FRANKARÍKI, Nantes, OM**
**Cecile og Jóhannis Mortensen**
**Sarah 14, Leah 11, Abigail 6**



Tað gongur væl í tænastuni, fíggjarligi stuðulin er støðugur, og familjan er frísk. Biðið um einleika, og at samkomulimir eru fúsir at tæna. Okkum tørvar eisini staðseting at halda fýra mánaðarmøti, sum byrja í sept.

**TÝSKLAND, Hückeswagen, Ethnos 360**
**Wina og Benjamin Hansen**
**Noah Elias 13**

Tá eitt starvsfólk okkara gavst, mátti eg, Benjamin, gera hetta arbeiði aftrat mínum egna. Hetta er nú vorðið ov mikið fyri meg.

Biðið, at onkur átakur sær arbeiðið at samskipa okkara uttanlands stutttíðartænastu.

## *22. dagur* *Áp. 9.23-43, Áp. 17.21-34, Áp. 26.1-18*

**DANMARK, Skovlunde**
**Sara og Andrew Berghamar**
**Lydia 8**

Vit verða í Danmark í summar. Okkum tørvar hvíld eftir eitt spennandi og avbjóðandi ár við nógvum virksemi. Biðið, at vit verða endurnýggjað í likami, sál og sinni.

**ÍSLAND, Reykjavík, Akurinn**
**Rósa og Jógvan Purkhús**
**Akureyri, Sjónarhæð, Ástjörn**

## *23. dagur* *3. Mós. 25.1-17, Neh. 11.1-36, 1. Kong. 5.1-18*

**FILIPSOYGGJAR, Puerto Prinsessa**
**Cathy og Jógvan J. Rasmussen**

Vit rættlesa eina umseting av 2. Mós. og fyrireika okkum eisini til Parola í aug.

**PAPUA NÝGUNEA**
**Lili og Brian Poulsen**
**Elliot 9, Jude 6, Evelyn 5, Olivia 1**

*23. august fyllir Ethan Flanagan 8 ár

## *24. dagur* *Áp. 10.1-23, Sálm. 57, Áp. 26.19-32*

**FILIPSOYGGJAR, Naplud (f)**
**Monika og Tim Sharp**
**Hanna 17**

Tim, eg og møguliga tvær døtur verða í Filipsoyggjum í summar. Frá 26. juni hava vit samfelagsmøtir í ættarbólkinum, har vit búðu fyrr. Eisini ferðast vit til ættarbólkar har um leiðir at vitja tey trúgvandi og uppbyggja tey í trúnni.

**PAPUA NÝGUINEA, Mengen**
**Annika og Simon Flanagan**
**Nya 17, Noah 16, Karis 12, Judah 10, Ethan 8**

**PAPUA NÝGUNEA**
**Lili og Brian Poulsen**
**Elliot 9, Jude 6, Evelyn 5, Olivia 1**
*24. august fyllir Louis Hansen 8 ár

## *25. dagur* *3. Mós. 25.18-38, Áp. 18.1-28, 1. Kong. 6.1-22*

**SENEGAL, Tongia**
**Lív Poulsen**
Bíbliutímarnir byrjaðu aftur í apr. Nýggj fólk eru komin, og summi, ið komu fyrr, eru nú aftur. Biðið, at tey skilja boðskapin. Eg kom heim miðjan mai, tí svágur mín brádliga fór heim til Harran, og eg veit ikki enn, hvussu leingi eg verði. Biðið, at Harrin gevur vísdóm at leggja restina av árinum til rættis. Eg arbeiði við at gera ymiskt klárt til at prenta og at dagføra ymiskt av tí, sum er umsett í GT. Eg eri takksom fyri, at húsini hjá mær í Porkeri nú eru liðug, og at eg kann flyta inn.

## *26. dagur* *Sálm. 52, Neh. 12.1-26, Áp. 27.1-20*

**SENEGAL, Dakar**
**Marion og Hans Arni Jensen**
**Ryan 16**




Marion og konan, hon samstarvar við, vitjaðu Baga-toymið, sum virkar í einum ættarbólki í Guinea. Fleiri eru um at læra málið. Ein trúgvandi fekk sýru í eyguni í arbeiðsóhappi. Biðið, at hann verður frískur. Minnist samfelagstevnuna 6.-11. juli, sum Marion fyrireikar saman við øðrum. Starvsfelagin hjá Hans Arna fer frá eftir meir enn 30 ár í starvi. Nú leita vit eftir avloysara. Ryan byrjar í 11. flokki og hevur nú bert tvey ár eftir.

## *27. dagur* *Áp. 10.24-48, Áp. 19.1-22, 1. Kong. 6.23-38*

**VENESUELA, Puerto Ordaz**
**Nurimar og Jóhannus Frants Poulsen**

Hálvan juni fara vit nakrar dagar við næmingum frá bíbliuskúlanum at hjálpa eini samkomu við teirra evangliserings- og læruarbeiði í smærru bygdunum. Fyrstu vikuna í juli vitja vit trúboðarastevnu í heimasamkomuni hjá Nurimar. 16. juli - 3. okt. verða vit í Føroyum og vitja tá fegin samkomur.

## *28. dagur* *3. Mós. 25.39-55, Neh. 12.27-47, Sálm. 62*

**OM, LOGOS HOPE, TeenStreet, DOULOS HOPE**




Biðið fyri OM Føroyar. Øll starvsfólkini hava lagt frá sær, og toymið skal skipast av nýggjum. Margareth D. Djurhuus, sum hevur drúgvar royndir síðan 2006, verður dagligur leiðari í eitt ár fram. OM tørvar fólk til hirðarøkt av stutt- og langtíðar trúboðarunum, til bókhald og skrivstovuarbeiði og fólk at røkta sosialu miðlarnar. Áhugað kunnu ringja til 219923 ella skriva til Margareth.djurhuus@om.org. TeenStreet verður í Týsklandi 31. juli - 7. aug., har einir 400 føroyingar luttaka. Biðið, at tey ungu og hjálparfólkini verða uppbygd andaliga og koma styrkt heim við nýggjum áræði at tæna Gudi. Logos Hope kemur til Føroya í 2026. Biðið, at hetta eydnast væl, bæði fíggjarliga og við samskipan.

## *29. dagur* *Áp. 11.1-30, Áp. 19.23-41, Áp. 27.21-44*

**TEILAND, Chiang Mai**
**Corine og Sørin Joensen**
**Aron 13, Noah Kristian 11**

Biðið framhaldandi fyri starvsfólkum okkara, sum eru í tænastu í Tailandi, Japan, Avstralia og Mongolia, at Harrin virkar gjøgnum

tey, sum tey tæna trúboðarum, ið møta nógvum avbjóðingum og truplum støðum.

*29. juli fyllir Timon Hansen 6 ár

## *30. dagur* *3. Mós. 26.1-26, Neh. 13.1-14, 1. Kong. 7.1-26*

**Mission Aviation Fellowship,**
**MAF Føroyar**
**Andrias Hansen,**
**trúboðaraflogskipari við MAF**



Eg virki nú aftur sum floginstruktørur í Hollandi. Seinni í summar fái eg helst boð um, hvar eg skal flúgva. Bestu tíðindini eru, at Martha og eg skulu giftast í summar. Takk fyri allar forbønir.

**JAPAN**
**Shino og Hallur Mortensen**
**Kano 15, Nana 13, Louie 11, Rio 6**
Vit hava møtir á enskum tvær ferðir um mánaðin. Biðið, at vit røkka út bæði til útlendingar og japanar, sum vilja læra enskt. Vit verða heima í Føroyum í aug.


| | |
|---|---|
| Útgevari | KBS (Kristniboðssambandið) |
| Blaðnevnd | Róland í Skorini, ábyrgd, Ernst Olsen, Elsa í Skorini, Randi Østerø, Dóra D. Gaard, Kristianna J. Heinesen, Óli Jákup Jacobsen, Jónvør Christiansen, Durita Olsen, Barbara og Ragnar Vest og Sigurð Ó. Vang. |
| Avgreiðsla | Óla Hendrik av Fløtum, tel. 227057 |
| Uppseting | Grafikmaster, tel. 502022 |
| Myndasavn | info@grafikmaster.fo |
| Prent | Føroyaprent, tel. 314555 |
| Teldupostur | prayerservicefo@gmail.com |
| Heimasíða | www.kbs.fo |

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
SVANAMERKTUR PRENTLUTUR 541 705



©KBS. Loyvt er at endurgeva tilfarið, um keldan verður nevnd.

## *31. dagur* *Sálm. 58, Áp. 28.1-15*

### THE VERITAS FORUM

John Lennox, professari, talaði í New York í 2013 um skapanarsøguna:
youtu.be/0FmO2XKMe6g?si=aw5ZdSALBNsGIsw_

### BÓKATÆNASTAN

Biðið fyri bókatænastuni hjá Leirkerinum og Logos Hope!

### NÝGGJ BÓK!

**612 síður        250 kr.**

Læruríkar viðmerkingar til hvønn kapittul í Gamla Testamenti. Warren W. Wiersbe skrivaði tríggjar bøkur við viðmerkingum til hvønn kapittul í Bíbliuni, og nú hevur Páll á Lakjuni eisini umsett triðju og seinastu bókina til føroyskt.




FORLAGIÐ LEIRKERIÐ

Bílegging á www.leirkerid.fo
Kráargøta 36 • Klaksvík
Tel. 718191 • leirkerid@leirkerid.fo